# Reglur um burturkast frá virkjum í IRF-limakommunum

Hesar reglur eru samtyktar á aðalfundi felagsins 3. mai 2007

7.11 Flutningsfelagið skal tryggja, at burturkast ikki dettur úr bili undir flutningi.

7.12 Virki ella onnur, sum koyra burturkast við egnum flutningsfari skulu fylgja somu treytum, sum flutningsfeløg umrødd frá 7.6 til 7.10.

**8. Innsavning og flutningur av serliga dálkandi og vandamiklum burturkasti**

**IRF sum flutningsfelag**

8.1 Virki skulu boða IRF frá í góðari tíð, at tey vil hava serliga dálkandi ella vandamikið burturkast heintað. Er meira burturkast fráboðað enn móttøkuorka er til, verða virki sett á avgreiðslulista.

8.2 Ábyrgdina av, at burturkastið verður heintað, flutt og viðgjørt á rættan hátt, hevur IRF.

8.3 Bilførarin hevur bert skyldu til at taka burturkast, sum er skilt samsvarandi Fylgiskjali 1, er væl merkt, og í hóskandi goymslu.

Bilførarin skal kunna koyra flutningsbilin fram at goymsluni. Goymslurnar mugu hóska til innsavningarskipanina hjá IRF.

8.4 Bilførarin skal skoða burturkastið, áðrenn hann tekur tað upp á flutningsbilin. Kann bilførarin ikki út frá skoðanini avgera, hvør burturskastflokkur er í goymsluni, kann hann krevja skrivliga váttan frá virkinum um, hvønn burturkastflokk talan er um. Í serligum førum kann bilførarin nokta at taka burturkastið.

8.5 Bilførarin skal tryggja, at burturkast ikki dettur úr bilinum undir flutningi.

**Onnur flutningsfeløg**

8.6 Virki ella onnur, sum koyra burturkast við egnum flutningsfari skulu fylgja somu treytum, sum flutningsfeløg umrødd frá 7.6 til 7.11.

**9. Gjøld**

9.1 Virki gjalda fyri heinting, flutning, móttøku og viðgerð av burturkasti, sambært takstskipan felagsins.

9.2 Taksturin er fyri skilt burturkast í goymslu, sum hóskar til innsavningarskipanina hjá IRF. Annars hevur IRF rætt til at taka eykakostna fyri arbeiði sambært galdandi takstskipan.

9.3 Kemur annað flutningsfelag við burturkasti, sum ikki er skilt sambært forskriftum frá IRF, verður flutningsfelagið kravt eftir meirkostnaði fyri neyðuga skiljing, sambært galdandi takstskipan hjá IRF.

**10. Fyrispurningar og fráboðanir**

10.1 Fyrispurningar og fráboðanir viðvíkjandi burturkasti skulu stílast til høvuðsskrivstovuna hjá IRF.

**11. Undantøk**

11.1 IRF kann í serligum førum gera undantak frá hesum reglum.

11.2 Nevndin í IRF hevur heimild til at gera broytingar í fylgiskjølunum til reglurnar.

**12. Eftirlit**

12.1 Tann einstaka limakommunan í IRF hevur eftirlit við, at ásetingar í hesum reglum verða fylgdar.

12.2 Verða viðurskifti, sum ikki eru í samsvari við reglurnar staðfest, skal eigarin gera avtalu við kommununa um, at fáa hesi viðurskifti í rættlag innan ávísa freist.

12.3 Kommunan boðar IRF frá, at viðurskiftini eru komin í rættlag.

**13. Kærur**

13.1 Kærur um innsavning av ruski og burturkasti skulu stílast beinleiðis til høvuðsskrivstovuna hjá IRF.

13.2 Virki kunnu kæra avgerðir hjá IRF eftir hesum reglum til avvarandi kommunu.

13.3 Kommunur kunnu kæra avgerðir hjá IRF eftir hesum reglum til Heilsufrøðiligu Starvstovuna.

**14. Revsing**

14.1 Verða ásetingar í hesum reglum ikki hildnar, kann IRF nokta fyri at taka ímóti ruski og burturkasti frá virki . IRF boðar viðkomandi kommunu frá hesi avgerð. Møguligt brot á lógir og kunngerðir nevndar í §1.1 kunnu verða revsað sambært ásetingum í hesum.

**15. Gildiskoma**

15.1. Reglurnar koma í gildið 30 dagar eftir, at tær eru samtyktar á aðalfundi felagsins.

15.2. Broytingar í hesum reglum skulu samtykkjast á aðalfundi felagsins.

15.3 Reglurnar verða lýstar í stóru dagbløðunum og á heimasíðuni www.irf.fo í seinasta lagi eina viku eftir, at tær eru samtyktar á aðalfundi felagsins

## Fylgiskjal 1: Skiljing av burturkasti

**Burturkast, sum skal endurnýtast**

Burturkast til endurnýtslu skal býtast upp í hesar flokkar:

- bildekk
- elektroniskur útbúnaður
- jarn og metal
- hvítvørur
- klárt plast
- køli- og frystiútbúnaður
- papp
- pappír
- stórsekkir
- garnaleivdir

**Burturkast, sum skal brennast (brenniburturkast)**

Í hesum flokki er burturkast, sum ikki skal endurnýtast ella tyrvast ella er serliga dálkandi ella vandamikið at brenna, sum t.d.:

- lívrunnið burturkast
- timburleivdir og timburúrdráttir
- vátt ella skitið pappír
- plast sum ikki skal endurnýtast
- annað blandað burturkast

**Burturkast, sum skal tyrvast**

Burturkast, sum skal tyrvast, er burturkast, sum ikki kann brennast, endurnýtast ella er serliga dálkandi, sum t.d.:

- asbest
- eternit
- PVC
- trolleivdir

**Serliga dálkandi og vandamikið burturkast**

Serliga dálkandi burturkast er býtt upp í hesar flokkar:

- spillolja
- tungoljuslam
- oljudálkað vatn
- kemiskir løgir
- sýrur og basur
- eitur
- ljóskeldur við kyksilvri ella halogeni
- akkumulatorar og trukkbattarí
- battarí
- tungmetal
- trýstfløskur
- burturkast frá heilsuverkinum